# Geldof til Stavanger

Saman við seks øðrum vinnarum av friðarheiðurslønini, fer Bob Geldof at luttaka á ráðstevnuni »Point of Peace Summit 08« sum verður hildin í Stavanger í døgunum 10. til 12. september, í samband við at Stavanger er heimsins mentanarbýur 2008. Umframt hann koma eisini Rajendra Pachauri, Muhammad Yunus og Kim Dae-Junt á ráðstevnuna. Tað er avbjóðingin til umhvørvið, altjóða ósemjur, terror og leikluturin hjá miðlunum sum eru høvuðsevni á ráðstevnuni. Haakon krúnprinsur úr Noregi verður eisini við.



# Hodgson í Stavanger

Í mai mánaði varð skipað fyri festivalinum »Classic Rock« í Stavanger. Ein av luttakarunum var tann ikki ókendi, Rodger Hodgson sum eisini hevur spælt á summarfestivalinum í Klaksvík. Í Stavanger var hann eins væl upplagdur sum í Føroyum, og gleddist um at vera aftur: Hann spældi til konsert her fyri 35 árum síðani, meðan bólkur hansara »Supertramp« var í hæddini. Kvøldið eftir spældi hann í grannabýnum Sandnes. Hodgson ferðast nú sum solistur, og fær allastaðni spurningin um bólkurin verður sameindur aftur: - Never say never, er fasta svar hansara uppá spurningin. Íalt seldi bólkurin 60 mió plátur.



















